

Tvíburðarnir Brian og Kevin Sullivan vórðu sendir til Avstralia sum 10 ára gamlir

# SENDU FORELDRALEYSU BØRNINI AV LANDINUM TIL TRÆLAHALD

TEY FINGU TILBOÐ UM EITT NÝTT OG BETRI LÍV, MEN Í VERULEIKANUM VÓRÐU MEIRI ENN 100.000 BRETSK **BØRN MISBRÚKT** GROVLIGA, EFTIR AT TEY VÓRU SEND TIL LOND Í BRETSKA SAMVELDINUM VIÐ TÍ ALMENNA ENDAMÁLI AT ØKJA ARBEIÐSMEGINA OG TAÐ HVÍTA FÓLKIÐ Í HJÁLONDUNUM

Dreingirnir fingu lyfti um eitt ævintýrland, men fingu ístaðin hart arbeiði og vórðu misbrúktir



**MYNDIR:** THE TIMES




## BARNALAGNUR

**Árni Joensen:**
arni@sosialurin.fo


Tann 6. oktober í 1950 fóru teir 10 ára gomlu tvíburðarnir Brian og Kevin Sullivan undir ta longu ferðina, sum skuldi føra teir líka úr London til Ný Sælands. Teir vóru bert tvey av túsundtals børnum, sum vórðu send úr Bretlandi út til bretsk hjálond.

Stjórnin, sum nú ræðut fyri borgum í Bretlandi, hevur mett, at í tíðarskeiðinum millum endan á 19. øld og til seinnu helvt av 1960-árunum vórðu næstan 150.000 bretsk børn í aldrinum millum trý og 14 ár útflutt til lond í samveldinum sum lið í ymsum »verkætlanum«.

Endamálið við at senda børnini av landinum var í fyrsta lagi at avmarka útreiðslurnar, tí tað var dýrt fyri ta almennu fíggjarlógina at hava so nógv børn á barnaheimi. Eitt annað endamál var at útvega londunum í samveldinum tøka arbeiðsmegi. So seint sum í 1998 staðfesti ein kanningarnevnd hjá Parlamentinum, at í ávísan mun vóru grundgevingarnar fyri tiltakinum eisini rasistiskar. Í frágreiðing síni vísti nevndin á skjøl, har tað stóð, at tað var eitt politiskt mál at útvega londum í samveldinum »góða, hvíta arbeiðsmegi«.

Tey børnini, sum vórðu tikin úr sínum nærumhvørvi og send av landinum, vóru fátæk børn, børn hjá einligum mammum, foreldraleys børn og børn, sum vóru fødd uttan fyri hjúnarlag. Nógv børn fingu at vita, at teirra foreldur vóru deyð, men í fleiri førum var hetta als ikki so. Nú endaðu børnini á barnaheimi ella øðrum stovni hinumegin jørðina, og nógv teirra blivu brúkt til trælaarbeiði á bóndagørðum og verksmiðjum.



Avstralski forsætisráðharrin, Kevin Rudd, við einum av teimum gomlu bretsku barnaheimsbørnunum

## Misbrúkt

Tann 74 ára gamli Laurie Humphreys var 13 ára gamal, tá hann ein dagin í 1947 bleiv sendur av barnaheiminum í heimbýnum Southampton í Suðuronglandi til Avstralia. Í samrøðu við blaðið The Times greiðir hann frá, at ein dagin kom ein nunna á barnaheiminum til hansara og spurdi, um hann ikki hevði hug at sleppa til Avstralia at ferðast.

– Tey søgdu okkum, at Avstralia var eitt vakurt land hinumegin jørðina. Tey søgdu, at í Avstralia skein sólin alt samdøgrið, og at vit skuldu sleppa at sita á rossabaki í skúlanum. Í oyrunum á einum 13 ára gomlum drongi ljóðaði hetta sum eitt spennandi ævintýr, sigur Laurie Humphreys við The Times.

Men hann fekk annað at síggja. Í Avstralia bleiv hann fluttur á eitt dreingjaheim, og har bleiv hann koyrdur til arbeiðis longu tann fyrsta dagin.

– Ta fyrstu vikuna bleiv eg settur til at mjólka neytunum, men so varð eg settur til at hjálpa við ymsum byggiarbeiði. Tá eg fylti 14, fekk eg arbeiði sum trukkførari. Vit arbeiddu, svóvu og ótu. Tað var alt. Nógvir av dreingjunum lærdu ongantíð at lesa, og teir flestu blivu misbrúktir kynsliga og likamliga, sigur Humphreys. Ein frágreiðing, sum bleiv almannakunngjørd í 2001, váttar tað, sum hann sigur. Har stóð, at tey, sum stóðu fyri leiðsluni á dreingjaheiminum, vóru sum ringastu einaræðisharrar og sálarligir mannaátarar.

Humphreys greiðir eisini frá, at tá hann fór úr Onglandi, fekk hann eitt skjal, sum var ein váttan frá myndugleikunum um, at foreldur hansara vóru deyð. Men 49 ár seinni kom hann eftir, at hetta var ikki so. Tá fekk hann at vita, at pápin hevði verið á lívi 30 ár eftir, at Humphreys varð sendur til Avstralia, og at hann sjálvur átti fýra brøður og tríggjar systrar í Onglandi.

## Umbering

Fyri átta døgum síðani vóru Laurie Humphrey og 40 onnur bretsk barnaheimsbørn í avstralska tinghúsinum í Canberra, har tey hoyrdu avstralska forsætisráðharran, Kevin Rudd, biðja um umbering fyri tað, sum hann kallaði »ein myrkur kapittul í landsins søgu«.

– Samfelagsins vegna biði eg um umbering fyri hendan sorgarleik. Vit biðja um umbering fyri, at vit tóku barnaárini frá tykkum. Vit biðja um umbering fyri, at tit vórðu tikin frá foreldrunum og savnað á stovnum, har mong tykkara blivu misbrúkt. Vit biðja um umbering fyri tykkara líðingar og fyri, at tit ikki fingu tann kærleika og ta umsorgan, sum børn eiga at fáa, segði ein sera kensluborin forsætisráðharri.

Men tað var ikki bara hann, sum bardist við kenslurnar hesa løtuna. Tað gjørdu mangir av áhoyrarunum eisini og ikki minst tey gomlu barnaheimsbørnini.

## Ov seint

Bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, hevur játtað at hitta tey barnaheimsbørnini, sum framvegis eru á lívi, og ætlandi verður tað eina ferð fyri jól. Tá fer hann eins og starvsfelagin í Avstralia at biðja tey um umbering.

Men mong halda, at ein umbering er ikki nóg mikið í hesum føri, og at umberingin kemur ov seint. Haraftur-at er tað fallið fleiri fyri bróstið, at umberingin frá tí almenna Bretlandi kemur aftan á ta avstralsku umberingina.

– Tað er skammiligt, at okkara móðurland skal drála við at biðja um umbering, tí tað var tað, sum skipaði fyri hesum útflutninginum og hevði ábyrgdina, siga felagsskapirnir hjá teimum fyrrverandi barnaheimsbørnunum við The Times.

KELDA: THE TIMES